## DAGSINS MEINING

# Góðar páskir

Páskini er ein tann høgtíðin, saman við jólunum, flestu okkara síggja fram til sum ein týðandi part av lívinum. Jesusbarnið varð føtt á jólum - Jesuspápin doyði og reis upp á páskum. Hesar hendingar: Jesus føðing, deyði og uppreisn hava nú í 2000 ár verið ein av hornasteinunum í tilveru okkara. Hóast materielli gerandisdagurin tekur nakað frá hesum hendingum, tykjast tær kortini at standa so klettafastar í hugaheimi og trúgv okkara, at tær meira enn nakað annað merkja part av lívi okkara ár um ár.

Serliga á jólum og á páskum eru tankar okkara vendir móti júst tí partinum av heiminum, har Jesus varð føddur, vaks upp, doyði og reis upp - Ísrael ella Miðeystur. Staðurin Jerusalem, ið gongur aftur sum reyði tráðurin í heilagu bókum okkara, er tann dag í dag framvegis miðdepilin fyri mong mong menniskju. Hann hevur fostrað ikki færri enn tríggjar religiónir. Neyvan nakrantíð sum júst í dag hevur eitt einstakt pláss í heiminum átt so nógva umrøðu og havt so stóran áhuga millum manna sum júst Jerusalem. Vit minnast henda stað serstakliga um páskini. Tað var á Golgata, at Jesus varð krossfestur, og tað var har, at hann reis upp. Vit minnast hetta við sorg og gleði um sama mundið, tí Jesus sambart trúgv okkara lat sítt lív fyri okkum.

Men Ísrael og Jerusalem standa eisini fyri nøkrum øðrum í dag, enn tað vit í andaliga lívi okkara leggja í hesi pláss. Tá tú steðgar á slíka løtu og hugsar um tað, ið hendi fyri so langari tíð síðani, sleppur tú tí ikki undan at hugsa um viðurskiftini í dag. Her leikar sera hart á. Tosað verður um borgarakríggj, har ósek lata lív. Øll heimins eygu eru vend móti Miðeystri, har hesin sorgarleikur fer fram. Har hvør gevur øðrum skylduna fyri tey mongu vanlukkuligu drápini. Tað er sum um at allir partar í hesum máli hava mist tamarhaldið og ikki vita, hvat gerast skal fyri at steðga ræðuleikunum.

Vit eiga altíð at vera varin við at peika út syndarar – at peika út tey óndu. At gera okkum til dómarar. Jesus minti okkum á at vera góð við fíggindan. Í hesum lá kanska júst hetta vit øll hava so nógv brúk fyri í dag: hetta at semjast, hetta at lurta, hetta at vísa virðing hvør fyri øðrum, at vísa toleransu, at vera sosial mótvegis hvørjum øðrum. Ja rætt og slætt at elska hvør annan. Men hvussu kunnu ísraelskar mammur, ið hava mist synir sínar, dripnir í palestinskum sjálvmorðatsóknum, elska og hava virðing fyri palestinum! Hvussu kunnu palestinskir pápar, ið hava mist døtrar sínar, dripnar av ísraelskum hermonnum, elska og virða ísraelar! Er tað ikki júst hetta boðskapur Jesusus snýr seg um: at fyri at fáa frið og kærleika at trívast manna millum, mugu vit gloyma hatur og agg!

Orð og bara orð vil onkur siga. Tað ber jú ikki til. Jú, tað ber til, men so má virðingin og toleransan og harvið kærleikin – boðskapur Jesusar - fáa størri pláss í hjørtum okkara. Tað má vera pláss fyri bæði ísraelum og palestinum í Miðeystri. Tað má vera í hesum anda, at vit byrja páskahátíðina – at vit eisini fyrihalda okkum til tann veruleika, sum er í dag í heimstaði Jesusar. At vit minna á boðskap hansara og brúka hann í verki til tess at birta uppundir frið og kærleika. Sosialurin ynskir øllum viðskiftafólki einar góðar páskir.

**Sosialurin**

## VALGREINAR

# Góð røktarheimspláss - heldur enn papploysnir!

**Elin Lindenskov**
*valevni Javnaðarfloksins*
*www.lindenskov.com*
*elin@lindenskov.com*



Tað er av sera stórum týdningi, at røktarheim verða bygd til tørvin hjá røktarsjúklinginum. Eitt røktarheim krevur nakað heilt annað enn eitt vanligt heim. Á einum røktarheimi skal vera pláss fyri hospitalssong, vesi til rørslutarnað og øðrum røktaramboðum, sum tí eisini krevja meira pláss og meira rúm enn vanligt. Eitt røktarheim skal eisini verða bygt til at tola langt meira slit enn eini vanlig hús. Hetta førir við sær, at kostnaðurin slettis ikki kann sammetast við eini vanlig hús. Tí er tað einki annað enn rein populisma, tá ført verður fram, at røktarheim kunnu byggjast líka bíligt sum eini vanlig sethús. Allar tær verkætlanir, eg havi verið við í, vísa, at kostnaðurin fyri hvørt plássið er um eina millión við mvg. Og hetta eru ikki nakrar glæstriborgir. Hetta eru góð vanlig røktarheim, bygd til endamálið.

Umframt røktarheim er eisini brúk fyri vanligum ellisheimsplássum, sambýlum og umlættingarheimum. Kostnaðurin av hesum bústaðarháttum er væl minni. Á hesum plássum er prísurin helst um fimmhundraðtúsund.

Latið tykkum ikki lumpa av fólki, sum gykla við lágprísloysnum úr pappplátum. Vit føroyingar eru óførir til at renna eftir lágprísloysnum, sum í seinna enda kosta nógv meira. Hygg bara eftir innfluttu býlingahúsunum frá áttatiárunum, sum hava kostað Tórshavnar Kommunu fleirfaldað í umvælingum.

Til tey røsku gomlu eiga vit at arbeiða fyri, at íbúðir verða gjørdar, soleiðis at tey, sum ynskja tað, kunnu flyta úr egnum húsum í minni íbúð. Eigaraíbúðir ella leiguíbúðir. Hetta lættir í síðsta enda eisini um trýstið á ellisheimini. Einasta trygd fyri einum skilagóðum eldrapolitiki er at velja Javnaðarflokkin. Set X við lista C.

# Tjóðveldisflokkurin skírir Føroya Arbeiðarafelag at vera lygnarar

**Eyðólv Dimon**
*Valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy*



Í Sosialinum leygardagin kallar Høgni Hoydal forannin í FA og føroysku andstøðuna lygnarar. Hann byrjar viðmerking sína við at greiða frá, hvussu strævið tað er, at fólk hava aðra meining enn hansara.

"Huff, sum tað er oyðileggjandi at hoyra hetta niðurbrótandi róparíið…" sigur stakkals Høgni. Víðari skrivar hann: " Hava tey ongan politikk og ongar visiónir fyri Føroyar og føroyingar. Hava tey onki annað uppá hjartað enn at rópa Bøøøø…?" At vera so sjálvglaður og halda so lítið um onnur er helst strævið. Ein ivast um tað man vera Esmar Eysturoy og ikki formaðurin í Tjóveldisflokkinum, sum hevur skrivað viðmerkingina.

Tað er FA og løntakarin, sum hevur økt inntøkur landskassans.

Og seinni undir yvirskriftini "Kom til arbeiðis", tá raplar tað ordiliga fyri manninum. At heita á limirnar í FA at koma til arbeiðis, tað vísir hvussu langt úti formaðurin í Tjóðveldinum er. Um Høgni heldur, at tað er samgongan, sum hevur skapt tað hækkaða útflutningsvirðið, sum nú liggur í landsbankanum, so má hann trúgva um aftur. FA og restin av føroysku løntakarafjøldini, hava skapt meirinntøkurnar, men hjá Høgna Hoydal er lítið komið av skafti. Hann hevur sitið handan tjúkku veggirnar í Tinganesi í 4 ár, og hevur fullkomiliga mist følingina við, hvat Føroya fólk heldur um fullveldiskósina.

**Hvat hevur Høgni fingið av skafti**

Í formannstjakinum í SVF bleiv hann biðin um at striku undir í samgonguskjalinum, hvat var nátt av tí, sum samgongan hevði sett sær fyri at náa. Av tí, sum stendur á fyrstu síðu í samgonguskjalinum, var onki úrslit at seta striku undir. Fyrsta síða snýr seg júst um málsøkið, sum Høgni hevur umsitið. Men undanførslurnar manglaðu ikki. Grundlógin var ikki liðug, men hon var á veg. Sáttmali við danir var ikki komin undir land, tí danir vóru ikki til at samstarva við …o.s.fr.

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VALGREINAR

# Tey gomlu og røktarplássini

**Bjarni Djurholm**



Ov lítið er komið av skafti farnu árini. Eldrapolitikkurin og loysnir á røktarøkinum eiga tí at hava framíhjárætt komandi valskeið

Stórur tørvur er á røktarplássum. Hóast framburðurin farna mansaldurin er sjónligur í øllum samfelagnum, so halta røktarumstøðurnar fyri tey gomlu stórliga.

Tørvurin á røkt er ógvuliga ymiskur. Nógv gomul klára seg tíbetur væl. Hinvegin eru mong, sum eru óhjálpin, og sum meiri ella minni tørva persónliga røkt/hjálp runt sólarringin. Hvussu stórur tørvurin á røktarheimsplássum er, velst um, hvussu nógv heima-hjálp ber til at veita, men 250 er neyvan ov høgt sett.

Gongda leiðin hevur verið at byggja vanlig røktarheim. Hetta er loysn, sum tekur drúgva tíð og hevur higartil bert givið nøkrum sømuligar umstøður, meðan mong treingjandi ongi tilboð hava.

Hetta er ein óvirðilig støða, sum áliggur politiska myndugleikanum at loysa. Tíðin er tí komin, har stig verða tikin at fjølbroyta møguleikarnar, so øll røktarkrevjandi hava í boði nøktandi røktarmøguleikar.

**Nýggjur leistur**

Amboðið at røkka setninginum er, at ábyrgdin og myndugleikin á økinum fylgjast. Eftir hes-um leisti varð fyri stuttum barnaansingin løgd til kommunurnar. Síðani eru tilboð-ini har økt munandi. Stutta frástøðan millum brúkara og myndugleika hevur gjørt, at raðfestingin hjá kommununum verður endurspeglað úr hesum veruleika – til gagn fyri brúkaran.

Við royndunum frá barnaansingini, eiga kommunurnar tí at yvirtaka eldrapolitikkin, og skulu tær stuðlast at loysa tørvin á ellis- og røktarplássum.

Viðurskiftini á eldraøkinum eru sera ymisk. Meðan barnaansingin er lutfalsliga ein-føld, so er tørvurin á fjølbroytni í eldrapolitikkinum eyðssýndur. Tí eiga kommunur-nar skjótast at fáa heimildir at loysa tørvin á ellis- og røktarplássum eftir nýggjum regl-um, ognar- og fíggjarhættum.

**Trygg í aldurdóminum**

Slóðast skal fyri møguleikum, har valið ikki bert er millum verandi avmarkaðu røktarmøguleikar ella einki, men at lokalu myndugleikarnir fáa umstøður at virka fyri alter-na-tivum møguleikum, har til ber at:

- at keypa og umbygga hóskandi hús og reka bústaðin (traditionell loysn), ella
- at keypa/byggja og lat privat bjóða uppá raksturin í eitt áramál,
- at bygga smá røktarheim av sama slag (sniðhúsafyrimun)
- at investorar bygga smá røktarheim, sum kommunur leiga og reka,
- samansjóðing av nevndu /øðrum møguleikum, osfr.

Tað eru ótaldir ymiskir møguleikar at røkka málinum, so øll kunnu kenna seg trygg í aldurdóminum. Kommunurnar eiga at hava stýringina av eldraøkinum, og gjøgnum ásett góðskukrøv til røktina hava eftirlit við, at tænastan til hin einstaka altíð er opti-mal.

Ov lítið er komið av skafti farnu árini. Eldrapolitikkurin og loysnir á røktarøkinum eiga at hava framíhjárætt komandi valskeið. Øll góð hugskot at fara nýggjar leiðir eiga tí verða tikin við í fremjanini av málinum - at loysa málið um røktartørv til gomul í Føroyum.

# Rættindi í altjóða sjógvi

**Edmund Joensen**



Tá íð vit tosa um fiskirættindi hjá føroyingum í høvuðsheitum, so kann føroyska økið innanfyri 200 fjóringa fiskimarkið sammetast við óðalshagan, sum føroyingar eiga einsamallir, meðan fiskur í altjóðasjógvi kan sammetast við nógar gyllin í jørð sum føroyingar eiga í altjóðahaganum.

Meðan fiskurin á føroyska landgrunninum, sum vit her kalla "óðalshagin" er nakað sum ongin kan taka frá okkum, so er altjóðasjógvur ella "uttangarðshagin" ogn hjá føroyingum so leingi sum ognin verður røkt.

"Uttangarðsjørðin" ella fiskiskapur í altjóðasjógvi er nakað sum vaksast kann um, men bert við at røkja "hagan". Býtið av fiskinum, kvotum ella fiskidøgum fer nevnliga fram eftir søguligum tølum, sum byggja á tað, sum londini hava klárað at fiska árini frammanundan.

Fiskirættindi í altjóðasjógvi kunnu tí sigast at vera nógvir gyllin í jørð, sum vit partvíst hava arvað frá teimum ið undan fóru og sum eisini eru vunnin av teimum sum í dag fiska á hesum leiðum.

Hetta sigur okkum samstundis hvussu vandamykið tað er ikki at fiska allar altjóða kvoturnar ella ikki at brúka tilutaðu fiskidagarnar upp á hvørjum árið.

Føroysk fiskirættindi og fiskiskapur kunnu býtast upp í tryggjar høvustættir.

1. Fiskur sum føroyingar eiga innanfyri okkara egna fiskimark og fiska sjálvir.
2. Fiskur av føroyagrunninum sum vit býta um fyri at sleppa at fiska innanfyri hjá øðrum londum.
3. Fiskur sum føroyingar hava vunnið í hevd sambært søguligum rættindum í altjóðasjógvi.

Veruleikin er, at samgongan hevur ikki megnað at lagt soleiðis til rættis, at vunnin rættindi eru varðveitt, minni enn so. Ein stórur partur av fiskidøgunum eru ikki brúktir. Tí fer ein minking av fiskirættindum, ein sokalla niðurteljing fram hvønn einasta dag sum gongur. Henda skeiva gongd má steðgast.

Hesin fiskiskapur snýr seg um hundratals milliónir kr. um árið og tað snýr seg um ein munandi part av samlaða føroyska búskapinum. Júst her eru stórir vakstrarmøguleikar fyri búskapin baði á sjógvi og landi.

Føroyar eiga tí at hava ein málrættaðan politikk á hesum øki, sum gongur út uppá at varveita og vaksa um fiskinøgdina í alltjóða sjógvi, økja um "uttangarðsrættindi".

**Uppskot sambandsflokksins**

Sambandsflokkurin setti í seinastu tingsetu fram uppskot um, at løgtingið tók støðu til henda stóra spurning. Uppskotið legði upp til at gera eina nýggja burðardygga skipan fyri fjarfiskiflotan, sum ger tað møguligt at brúka og menna føroysk rættindini í altjóðasjógvi. Uppskoti fekk ta syrgiligu lagnu, ikki at koma aftur úr vinnunevndini.

Hetta sigur kanska mest um áhugan og ómegdina hja fráfarandi samgongu.

**Fiskidagaskipanin**

Sambandsflokkurin umsat fiskivinnumál og legði í 1996 rygg til fiskidagaskipanina. Skipanin regulerar fiskiskapin innanfyri 200 markið. Ongin skipan er fullkomin, tí tíðir og viðurskifti broytast.

Men henda skipan var onki minni enn ein kollvelting.Vinnan broyttist frá studningsvinnu til vinnu, sum gav avkast bæði á sjógvi og landi.

**Uppisjóvarflotin**

Skipanin sum sambandslandsstýrið legði fyri uppisjóvarflotan hevur víst seg at vera sera burðardygg. Flotin er effektivur og fleksibul. Flotin røkkur allar fiskileiðir sum føroyingar hava atgongd til við veiðiamboðunum nót og troli. Henda skipan royndist sera skilagóð.

**Fjarfiskiflotin**

Eftir er at gera er eina burðardygga skipan fyri fjarfiskiflotifiskan. Hesin floti fiskar sokallaðan botnfisk, sum í høvuðsheitum er rækjur, torskur, kongafiskur og annan fisk eisini.

Sambandsflokkurin fer ikki at gevast á hondum. Hesin parturin av flotanum, sum hevur umboðað ein stóran part av føroyska búskapinum eitt langt áramál, hevur sjálsagdan rætt til politiskt lagdar burðardyggar karmar.

Hvussu vit fáa brúkt og ment okkara fiskirættindi burðardygt og skilagott. Hesum fer Sambandsflokkurin eisini at syrgja fyri í eini komandi samgongu.

# Einligir forsyrgjarar fáa nýggjar bústaðarmøguleikar

**Malan Helgadóttir**
*Miðvágur*
*Valevni Javnaðarfloksins*



Íbúðarstøðan hjá einligum forsyrgjarum er út av lagi vánalig. Hetta kann og skal broytast. Vit skulu hava ein meira fjøltáttaðan búðstaðarmarknað, og skal Húsalánsgrunnurin menna hendan.

Vit hava sett út í kortið ein íbúðarpolitikk, sum fer at broyta bústaðarmynstri vit higar til hava kent.

Í einum framkomnum vælferðar samfelag hava øll rætt til ein bústað. Tíverri er okkara bústaðarmynstur soleiðis, at einligir forsyrgjaðar hava trupult við at halda sínar fíggjarligu skyldur, um tey eru so heppin, at hava egnan bústað.

Tá hús eru til leigu ella sølu, er tað fyri hægst bjóðandi. Einligir forsyrgjarar eru ikki førar fyri at vera við í kappingini.

Oftast eru tað kvinnur, ið eru einligir forsyrgjarar, og kunnu vit bara enn einaferð staðfesta, at tað almenna ikki brúkar nó nógva orku uppá at loysa henda trupuleika.

Støðan hjá einligum mammum er tí tann, at nógvar av teimum velja at búseta seg niðri. Har fáa tær bústað og fíggjarligan stuðul. Tær verða ikki straffaðar fyri at hava egna inntøku, ella fyri at móttaka útbúgvingarstuðul.

Heimaftur fluttar - tí tær vilja búgva í Føroyum - standa onkrar á gáttini at flyta av aftur landinum, tí tær ongan bústað fáa. Hesar kvinnur hava ongar møguleikar fyri sjálvar at keypa sethús.

Javnaðarflokkurin fer í komandi valskeiði at leggja stóran dent á, at skapa alternativar bústaðarloysnir. Familjurnar við einligum forsyrgjara fara tí at fáa møguleika, at vera búgvandi í Føroyum í framtíðini.

## Valtilfar í Sosialinum

Treytir fyri upptøku av valgreinum er, at tilfarið verður latið okkum sum teldupostur ella á diskli. Prísurin er hálvur lýsingarprísur.

Fyri valgreinar á valsíðuni í Internet-Sosialinum er prísurin 50 kr fyri hvørja grein, um ikki onnur avtala er gjørd við flokkarnar.

*Sosialurin*